Sjey stjørnur til Grímu

Leygarkvøldið var leikurin »Móðir Sjeystjørna« frumframførdur á Meiðarínum í Havn. »Góðska er ein realitetur, ein veruleiki«, sum stjørnuskaldið undir Varða vildi vera við, staðfestir ummælarin

THEODOR E. D. OLSEN

»Eg skrivaði Móður Sjeystjørnu í einum stórum, eydnuríkum íblástri«, segði William Heinesen í eini samrøðu í áttatiárunum. Og helst hava limirnir í leikbólkinum Grímu kent tað sama, tá teir hava arbeitt við at seta hesa skaldsøguna á pall, tí útkomin úr Meiarínum leygarkvøldið var eg ikki í iva: »Góðska er ein realitetur, ein veruleiki«, sum stjørnuskaldið undir Varða vildi vera við. Ikki bara teir spontanu menniskjansligu gerningarnir, framdir av næstrakærleika, men so sanniliga eisini góðskan, kvaliteturin í føroyskari leiklist 2000.

Tað er nevniliga heldur enn ikki ein djørv roynd hjá leikrithøvundanum og leikstjóranum, Ega Dam, og hansara fólki at fara undir at flyta eina so poetiska søgu á ein ítøkiligan pall, men kveikjarin William megnar enn á hundrað ára degnum at vera ein inspirationskelda hjá føroyskum listafólki.

Lív

Komin innar í meiarímyrkrið verða vit nevniliga beinanvegin sogin inn í tað serliga universið, har sjálvt lívið byrjar. Unga gentan Antonia, dóttir tann góðvarna keypmannin, eigur eitt barn. Men eins ektaður og móðurkærleikin hjá Antoniu er, eins óektaður er hesin hjálparleysi nýføðingurin í eygunum hjá Trinu, ið sum frægast og eftir bestu sannføring hevur roynt at uppalt Antoniu. Jákup, sum hesin drongurin verður doyptur, er nevniliga føddur uttan fyri hjúnarlag, og er sostatt sambært hesi serligu kristnifatan enn ein frukt av kunnleikans træi. Og tær vaksa sum ókrút, skulu vit trúgva tí eldru.

Men munur er á kvinnum, og meðan Trina gamla í sínum einsemi neyvan hevur kent tey mongu mannfólkini, eru tað fleiri, ið verða hugtiknir í tí ungu Antoniu, sum við sínari lívsgleði og merkiligu erotisku útstráling er keldan til alt framhaldandi lív, sum tó er og skal njótast her og nú.

Tað gongur tó ikki so væl hjá tí óivað vituga, men turrisliga og smávandna læraranum, Napoleon, at gera Antoniu lukkuliga. Hann dugir sína søgu og brúnu bøkur uttanat, men gloymir, at kærleikin hjá Romeo til sína Juliu var størri enn alt mannavit. Betur riggar hjá tí meira festliga Gravara Peturi, sum dugir at spæla harmoniku og at reypa frá sínum ferðum á heimshøvunum, at vinna hjartað hjá Antoniu. Tað eydnast tó Trinu at styggja hendan unga sjarmørin burtur, sum ikki er av so »góðum« fólki, og tí ikki nóg góður til hesa ungu gentuna.

Sonurin

Men lívið vil tó altíð vinna – eisini á tí ónda og á deyðanum – og hóast sóttin herjar, og Antonia saman við so nógvum øðrum doyr á ungum árum, veksur sonurin Jákup upp í sínum egna hugaheimi, har alt er nýtt.

Trina, sum enn einaferð hevur fingið uppgávuna at uppala eitt barn, roynir aftur sum frægast at gróðurseta sína kristnifatan í hetta lítla barnið, og verja tað móti synd og ólevnaði sum livandi hugflogi, pimparíi og kortspæli.

Tað er tó strævið hjá Trinu, hvørs lívsfilosofi áhaldandi minnir á, at verðin er ónd, at halda á spæla hin sjálvvalda leiklutin sum tann, ið altíð skal døma síni syndugu medmenniskju. Tá hevur ein nevniliga úr at gera, og lítli Jákup og hugaheimur hansara hóra undan tí myrka og lívsnoktandi áganginum frá Trinu. Ikki við beinleiðis uppreistri, men barnsligum forvitni og fantasii.

Heilt avrik

Sum áður nevnt er Móðir Sjeystjørna ein sera poetisk skaldsøga, sum hevur ikki sørt av mytiskum flogi og formi í sær. Tað var tí spennandi leygarkvøldið at siggja hvussu Gríma, ið er sera trúgv mótvegis bókini, megnaði at flyta heimsins nalva, gomlu Havnina, har alt upphav byrjaði og tók skap, á pall í Meiðarínum. Og júst pallurin var eisini við til at gera hesa framførslsuna til eina heildarmynd. Tað má sigast at sveinastykkið hjá tí unga scenografinum royndist avbera væl. So við og við vórðu funktiónirnar við pallinum opinberaðar fyri okkum áskoðarum, og gjøgnum allan leikin stuðlaði scenografiin leikarunum og søgugongdini, og ikki minst saman við tónleikinum undirstrikaði hetta tað skiftandi huglagið. Pallmyndin stjól ongantíð sjálva myndina, men var við til at skapa eindarmyndina, ið Móðir Sjeystjørna sum sjónleikur er. Vit møta nevniliga nógvum persónum í leikinum. Ja, eg taldi fjúrtan í tí snøggu og kunnandi leikskránni, men hesum megna teir seks leikararnir úr Grímu at geva lív, uttan at áskoðarin verður ørkymlaður av teimum ofta títtu skiftunum. Her sleppa vit rættiliga at síggja hvussu fjøltáttaðum og gávuríkum sjónleikarum Gríma veruliga er mannað av.

Leikritið

Tað er heldur ikki á hvørjum degi at nýggj føroysk leikrit síggja dagsins projektørljós, og sum heild er tað enn einaferð hepnast Ega Dam væl at skriva leikrit. Sjálvandi leita tankarnir altíð aftur til upprunasøguna, tá talan er um kenda bók, og tað vil so vera, at onkrar nuancur og brigdi hvørva, tá ein miðil verður útskiftur við annan og enntá konkretiseraður. Eitt nú kundi tú spurt um grundina til óndskapin og misskiltu góðskuna í leikinum, og um persónarnir, ið umboðaðu daprasta svartskygni, í grundini ikki kundu verið lýstir meira sympatiskt og við størri medviti, hóast áskoðarin tó sær hvørjum korum tey liva undir. Alt hevur jú sína orsøk.

Móður Sjeystjørnu haldi eg tó vera eitt heppið val, tá talan er um eina søgu, sum skal umboða kjarnuna í skaldskapinum hjá Williami, tí hesin mytiski og samstundis stutti og greiði frásøguhátturin lýsir kanska betur sjálva góðskuna, sum sambært høvundanum hóast alt býr í menniskjanum, enn hevði tað sosialrealistiska perspektivið fingið takið á fortelljingini, sum t.d. í onkrari av teimum eldru og drúgvaru skaldsøgunum, men sum hinvegin tó kanska kundi sýnt okkum, hví menniskjuni gera sum tey gera.

Tillukku Gríma

Slíkt kann ein altíð hugsa um aftan á, tá leikurin er sodnaður í sinninum, men meðan eg sat og hugdi, kendi eg meg bæði heima í hesum mytiska frumbýnum, har lítli Jákup var dømdur at vaksa til mans millum góðsku, skygni og alt køvandi mistreysti, og eg ræddist, tá tær gróðursettu myrku kreftirnar, sóu út til at vinna.

Men størstur av øllum er hóast alt kærleikin, og eins og tokkin til leiklistina ivaleyst hevur drivið verkið hjá Grímu, eiga vit eisini at vera góð við okkara yrkisleikbólk, sum enn einaferð hevur ríkað okkum við einum góðum leiki. Onkuntíð hevur tað kanska sæð út sum hesin bólkur kanska skuldi fingið somu lagnu sum okkurt av børnunum í Móður Sjeystjørnu, nevniliga at blíva offrað í sínum ungdómi á onkrum vígvølli av profitthungrandi valdsharrum ella berari líkasælu. Men sigast má, at Gríma sum langt síðani er farin um tey tjúgu, hevur fingið tað at rigga á Meiðarínum.

Sjeystjørnan verður eisini nevnd Pleiadurnar. Hesar vóru í griskari mytologi tær sjey døturnar hjá Atlasi, ið noyddist at bera himnahválvið á sínum herðum. Hiðani kunnu vit bert staðfesta, at í hesum døgum ber Gríma lættliga hæddirnar í føroyskari leiklist, og vón mín er, at tey framhaldandi fara at vísa okkum, at góðska veruliga er ein realitetur.

Sjey stjørnur til Ega og tey.

At vera heima á jørðini

Heðin M. Klein helt røðu, tá minnisvarði til minnis um William Heinesen varð avdúkaður leygardagin

Hann sá fyrstu ferð dagsins ljós, keypmanssonurin Andreas William Heinesen, ein 15. januar, best sum fólk vóru farin at venja seg við at skriva 1900 – t.v.s. tey fáu her á landi, sum yvirhøvur fingust við at skriva ella høvdu áneyðir fyri slíkum ella dugdu til sovorðið. Og nú øldin er fullrunnin, rætt dagin í dag, í hesum Harrans ári, sum er so ovbyrjað av øllum sínum nullum, eru vit komin saman higar at staðfesta, at danska munnmælið: *um hundrað ár er alt gloymt* – kanska er rætt á tí persónliga økinum og í teirri ítøkiligu hendingini, men fer heilt skeivt, tá ið ræður um okkara felags gleði og takksemi uppi yvir stórslignum og fjølbroyttum manndómsverki í einum longum og virkisríkum lívi, hansara, sum sá dagsins ljós 15. januar í árinum 1900.

Tí at tá var hann føddur. Men gitin var hann og livdi í móðurlívi í 1800-árinum, tí seinasta, í øldini við Napoleonskríggjum, Nólsoyar-Páli og Brillumanninum, einaveldi og einahandli, men eisini við fólksligum rembingum, byltingum og sosialismu, skipsfiskiskapi og tjóðskaparrørslu. Í grundini havi eg leingi hildið, at William Heinesen, tó at hann á so mangan hátt er eitt eyðkent barn av 20. øld, í sínum baksýni hevur sterkar røtur longur aftur í tíðina, mentanarliga og málsliga, og tað er ikki minst mótspælið og samspælið ímillum gamalt og nýtt, í hugsan, hugdámi, málføri og listarligum búna, sum ger skaldskap hansara og aðra list, sum hann hevur íðkað, so einsýna forkunnuga og spennandi. Nú siga tey kønu, at 19. øld var ikki av fyrr enn í 1901, men kanska hon, við síni hugtiknu og og hugtakandi ljósu framburðstrúgv, toygdi seg upp aftur longur. Tað heldur ið hvussu er William sjálvur í eini minnisrún um Havnará, sum kastaði hvørvisjón yvir seg niðri í býnum, men enn rennur her uppi í óbygdum:

»Verðin tóktist so ung tá,« skrivar hann, »kríggj og ófriður hóttu ikki. Menniskjuni tá á døgum høvdu fastasta álit á framtíðini. Og vit, ið tá vóru piltar, fingu – snevilin av einari tíð og einum tíðaranda, sum so bráðliga hvarv í árinum 1914 – Í tí árinum snaraði tíðarinnar hurð um síni leikindi; søguliga sæð var *hetta* aldamótið og ikki kalendaraárið 1900.«

Í hesum *barndómsins tíðarhvarvi* er tað, at skaldskapurin hjá Williami Heinesen so týðiliga hevur sínar veruligu røtur, sínar vellandi keldur, og kanska, hvør veit: kanska eisini sítt treysti og sítt trúfesti? Úr hesum *útsýnistorni*, sum hann smíðar og byggir út, so tað verður rúmligari og fínligari og litríkari, sum árini renna, tekur at skyggja og glógva av ungdómi, av elli og ævinleika, og hiðani, úr erva á hesum torni, hevur hann frálíkt útsýni í tíð og rúmd.

Byrjanin

Tað byrjaði annars, alt, fyrst í tjúgunum, við trábeittari tilverugrundan í yrkingasavni eftir yrkingasavn, skoðandi løtuna í ævinleikans mátistokki, við symbolistiskt løddari yrking og við føroysku náttúruni sum myndabrunni og leiktjaldi. Sum so, um tíggjuáraskiftið, snaraði í samfelagskritiska og moraliserandi ætt, yvir í skaldsøguna, yvir í skaldsins episka og *etiska tíðarskeið*, sum Chr. Matras hevur nevnt, ta breiðu frásøguna, sum hann øll tríatiárini og fjørutiárini stríddist við, at fáa hana at legnast fyri sær rættiliga, í stórum og stórt ætlaðum merkisverkum, til tað umsíðir eydnaðist honum *heilt* fyri hálvaldarskiftið, tá ið hann endiliga hevur skrivað seg fram á sína egnu episku skrift, hevur funnið sín sermerkta frásagnarstíl, sítt útsýni og sín form: tit vita, henda mytiska, broderandi, poetiska, fabulerandi, sum onkur nevnir magiska realismu, og sum vit tí, ekkaleys, taka upp aftur her, av tí at navnið spillir ongan.

Lívsins meining

Eitt er at nevna, sum óloysiliga er knýtt at prosaskrivingini hjá Williami Heinesen, og sum seinni tekur seg upp í yrkingunum við: hesin serligi undirstreymur av góðvild og mannatokka, ið seyrar ímillum reglurnar í bókunum og altíð lýsir av summum umráðandi persónum í skaldsøgunum og í stuttsøgunum. Hesin hjartareini fløvin er tað, hetta óspilta og óuppgjørda sinnislætið, henda óumhugsaða góðskan, kanska opinlýs,

Framhald á síðu 12

Salmonella í hundakrási

Serfrøðingar í Danmark hava staðfest salmonella í sonevndum hundasnacks. Teir biða fólk ansa eftir, tí fólk eru í smittuvanda. Føroyskir handlar innflyta hundakrás úr Danmark.

DÁNJAL HØJGAARD

Danska Plantudirektoratið hevur tikið stakroyndir av sonevndum hundasnacks. Hetta er krás til teir fýrføttu, gjørt av turkaðum svínaoyrum, svínatrýni og svínasinu.

Í triðja hvørjum føri var salmonella staðfest í krásinum.

Talan er um tað vandamiklu multi-mótstøðuføru salmonella DT104, sum er ógvuliga trupul at handfara, skrivar danska blaðið Aktuelt í gjár.

Krevur ansni

Ein serfrøðingar, sum granskar í djórasjúkum, sum kunnu smitta fólk, biður fólk ansa eftir. Fólk kunnu fáa Salmonella-bakteriuna, tá tey geva hundinum teir dálkaðu bestubitarnar, verður sagt.

- Sleikir tú tær um fingrarnar aftaná ella fer tú at matgera uttan at vaska hendur, so kanst tú verða smittaður av salmonella. Tað sama er galdandi fyri smábørn, sum grulva á gólvinum, um tey súgva hunda-bitarnar ella koyra teir í munnin, sigur Flemming Bagger, ráðgevi á danska Zoonosecentret við Aktuelt.

Einki frætt

- Hetta havi eg einki hoyrt um, sigur Niels Mortensen, stjóri í SMS í Havn.

Miklagarður er ein av handlunum í Føroyum, ið selur krás til hundar, og hundakrásið í Miklagarði kemur úr Danmark.

Niels Mortensen sigur, at Miklagarður plagar altíð at frætta frá fyritøkunum, sum handilin keypur vøruna frá, tá vandi er fyri salmonella. Men hann hevur einki hoyrt um nakran vanda í sambandi við hundakrásið, sigur hann.

- Hetta má eg fara at kanna, sigur stjórin í SMS.

Smittukeldan funnin

Flemming Bagger heldur, at myndugleikarnir við hesum hava loyst gátuna um nakrar av DT104-tilburðunum í Danmark, har tað higartil ikki hevur borið til at staðfest smittukelduna.

Hundinum sjálvum nýtist ongum at vera bangin fyri, sigur Flemming Bagger.

- Teir eru ránsdýr við sterkari sýruforðing, sum drepur salmonellabakteriuna áðrenn hon sleppur niður í magan, sigur hann.

Tað er eingin vandi fyri hundinum. Men fólk mugu hinvegin ansa eftir, nú salmonella er staðfest í hundakrási

Tilvildarlig mynd

Skeiv gongd í byggimálum

Tað kostar dýrt, at bygningar ikki verða skoðaðir fyrr enn arbeiði er liðugt. Tað sigur Brunaumsjón Landsins, sum fyrireikar eina kunngerð, ið skal tryggja, at avvarðandi myndugleikar verða hoyrdir áðrenn byggiloyvi verða latin.

DÁNJAL HØJGAARD

- Hetta er keðiligt fyri byggiharran. Tað setur hann í eina ringa knípu.

Petur á Lava Olsen, stjóri á Brunaumsjón Landsins er sera misnøgdur við mannagongdina, sum verður nýtt, tá bygningar verða reistir - eisini umbygdir.

Eftirlitsstovnarnir, sum skulu góðkenna bygningarnar verða ikki hoyrdir fyrr enn arbeiðið er liðugt. Hetta kemur mangan dýrt aftur um aftur, tí eftirlitsstovnarnir krevja mangan ábøtur og broytingar, sum byggiharrin ikki hevur tikið fyrivarni fyri.

Við øðrum orðum kann bygningurin gerast nógv dýrari enn roknað var við.

Byggiloyvi - uttan hoyring

Petur á Lava Olsen fílist á, at kommunurnar í Føroyum kunnu skriva út byggiloyvi - uttan at avvarandi myndugleikar fyrst hava mett um byggingina. Hetta er bæði galdandi fyri nýbygging og t.d. um eini sethús verða umbygd til barnagarð.

Kommunurnar kunnu spyrja avvarandi stovnar eftir, men tað er eingin treyt.

Er talan um t.d. røktarheim, ansingarstovn, sjúkrahús ella gistingarhús, so skal bygningurin kortini góðkennast áðrenn hann verður tikin í brúk. Og tástaðni koma stovnar sum Brunaumsjónin, Starvsstovan og Arbeiðseftirlitið inn í myndina - mangan við kostnaðarmiklum krøvum.

- Tá teir avvarandi myndugleikarnir koma aftur um aftur, hevur kommunan mangan hug at seta teir til viks, sigur Petur á Lava Olsen.

Brunaumsjón Landsins fyrireikar eina kunngerð, sum skal tryggja, at kommunur ikki kunnu geva byggiloyvi áðrenn avvarðandi myndugleikar hava úttalað seg um málið

Tilvildarlig mynd

Órættvíst

Stjórin á Brunaumsjónini heldur, at framferðin í byggimálunum er órættvís móti byggiharrunum, sum mangan eru óroyndir á økinum.

- Í mongum førum royna teir seg sum byggiharrar fyri fyrstu ferð. Tí handla teir í roynd og veru í góðari trúgv, sigur Petur á Lava Olsen.

Kunngerð í uppskoti

Til tess at binda um heilan fingur er stjórin á Brunaumsjónini tí farin undir at orða eitt uppskot til kunngerð, at leggja fyri landsstýrið. Eina kunngerð, sum skal tryggja, at teir avvarandi stovnarnir verða eftirspurdir áðrenn farið verður í gongd.

- Kunngerðin skal tryggja, at kommunan í síni málsviðgerð hevur eina hoyring millum teir avvarandi myndugleikarnar áðrenn skrivligt byggiloyvi verður latið, sigur Petur á Lava Olsen, sum ætlar at tosa við hinar eftirlitsstovnarnar áðrenn uppskotið verður lagt fyri landsstýrið.

SPINNING
AEROBIC
BALLETT

NÚ BYRJA VIT AFTUR

Yndi ***kann bjóða flest øllum okkurt slag av kropsvenjing. Kvinnum sum monnum, ungum sum eldri, stórum sum smáum, sterkum sum veikum.***

Byrjað verður aftur mánadagin, 10. januar og halda vit á til leygardagin, 15. apríl.

Nýtt Nýtt Nýtt **SPINNING** Nýtt Nýtt Nýtt

Sum nakað spinnandi nýtt kunnu vit nú fyri fyrstu ferð í Føroyum bjóða tímar í SPINNING, sum seinastu árini er vorðin sera vælumtókt viða um. SPINNING er sera gott fyri ♥, lungu og blóðrenslið sum heild. Eisini er SPINNING sera konditiónsstimbrandi og samstundis ein ógvuliga góður háttur at klænka seg. Samstundis kann SPINNING iðkast av øllum, eisini teimum við veikum liðum ella ryggi.

Tíðirnar verða hesar:

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag
	18:00 – 18:50 Spinning Feittknusari		18:00 – 18:50 Spinning Feittknusari
19:00 – 19:50 Spinning	19:00 – 19:50 Spinning	19:00 – 19:50 Spinning	19:00 – 19:50 Spinning
20:00 – 20:50 Spinning		20:00 – 20:50 Spinning	

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ
1 ferð um vikuna: 450 kr.
2 ferðir um vikuna: 780 kr.
3 ferðir um víkuna: 1.100 kr.

Byrjunartilboð 25% í avsláttri
Bert galdandi frá mánadegnum, 10. januar til hósdagin, 20. januar

AEROBIC

Trimmari – Aerobic – Stepp + styrkivenjing – Venjing uttan hopp – Menn – Mix.

Fá meira at vita hjá Yndi, ella kom framvið og fá tær ein faldara ella eitt prát.

Tíðirnar verða hesar:

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag	Leygardag
17:15 - 18:30 Aerobic *Vand*	17:45 - 19:00 Stepp + Styrki *Øll*	17:15 – 18:15 *Tilkonnar kvinnur* Low	17:15 – 18:30 Stepp + Styrki *Øll*	15:00 – 16:30 Mix
18:30 - 19:30 Aerobic *Byrjarar*	19:00 – 20:00 Trimmari *Øll*	18:15 – 19:15 Aerobic *Byrjarar*	18:30 - 19:45 Aerobic *Vand*	
19:30 - 20:30 Trimmari *Øll*	20:00 - 21:15 Mix strævin *Vand*		19:45 - 20:45 Trimmari *Øll*	
20:30 - 21:30 *Menn*				

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ

	60 min.	75 min.	Skúlanæmingar
1 ferð um vikuna :	450 kr.	560 kr.	20 % avsláttur
2 ferðir um vikuna:	690 kr.	860 kr.	20 % avsláttur
3 ferðir um vikuna:	790 kr.	975 kr.	

BALLETT

Byrjað verður aftur mánadagin, 10. januar og halda vit á til fyrst í mai.

Tíðirnar verða hesar:

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag
15:45 - 17:00 Klassiskt *Vaksin*	16:45 - 17:45 *6 - 8 ár*	15:45 - 16:45 *9 - 12 ár*	16:00 - 17:00 *13 ár og eldri*
		19:15 – 20:30 Dansur *Vaksin*	

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ
6-12 ár: 375,- kr.
13 ár og eldri: 450,- kr.

Sjálvandi er altíð møguligt at fáa ókeypis royndartíma í SPINNING, AEROBIC og BALLETT. Møguleiki er hjá feløgum, fyritøkum o.ø. at leiga tímar í Yndi.

Komið inn á gólvið ella ringið á tel.: 311 311, 310 025 ella 312 868.



YNDI

v/ *Elsa Maria Bærentsen*

Yviri við Strond 21
FO-100 Tórshavn
Tlf.: 311 311
Fax: 318 527
e-mail: yndi@post.olivant.fo